

Bilurin er á tremur av allarbestu ljóðútgerðini frá JBL (Harman)

4.500 watt á torginum í SMS

– rættilig Hi-Fi watt (RMS), væl at merkja. Øll 4.500 wattini koma úr einum bili, sum er sera væl útgjørdur við JBL-bilstereoútgerð frá ELDING

Alla hesa vikuna hevur ELDING ein bil standandi á torginum í SMS. Í bilinum er ljóðútgerð, sum fær einhvønn, ið dámar at hoyra góðan musikk, meðan hann koyrir, at spíla oyruni út.

Tað eru svensku PM BIL-STEREO SERVICE saman við verkfrøðingum frá JBL, USA (Harman), ið hava staðið fyri hesi fantastisku ljóðupplivingini. Teir hava saman við »Danmarksmeistaranum« í bilstereo, Thomas Ravn, givið bilinum eitt serligt snið og fylt hann við allarbestu JBL-ljóðútgerðini til bilar.

Eitt tað mest fantastiska við ljóðinum er, at miðtónin og diskanturin hoyrast ótrúliga reint og klárt, serliga tá ein hugsar um at har hóast alt er trýst frá 4 woofarum, sum hvør er 15".

Í bilinum er: 7 GTS 600 forsterkarar, 4 1500 GTI subwoofarar, sum tola 600 watt viðvarandi trýst og 1000 watt í peak. Woofararnir hava ein svingspola, ið er 4". Eitt sett av 508 GTI hátalarum, ið eru kosnir »Product of the Year '96« fyri higend komponent sett. Eitt GTX 47, elektroniskt deilifiltur við 7 rásum. Ein GTE 422, 11/22 bands equalizari. Alt hetta kostar tilsamans umleið 35.000 kr.

Mads Andreas Winther frá ELDING sigur, at ikki ber til at greiða frá, hvussu væl tað ljóðar. Tú noyðist at koma og hoyra tað!

Nú melur aftur í Lopra

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú melur aftur í Lopra

Gekst sum ætlað, skuldi verið klárt at bora aftur í nátt, eftir at arbeiðið hevði ligið stilt í 10 dagar av tí at borurin bleiv í óstandi.

Tað var ein blokkur sum fór og ein nyggjur skuldi koma úr Niðurlondum.

Hann vigaði fleiri tons og kom nú ein dagin við skipi og er settur uppaftur og borurin riggar nú, sum hann skal.

Eisini sunnudagin komu eykalutir til Lopra.

Eitt serligt sendiboð kom til Føroyar við eykaluti. Av flogvøllinum varð hann sigldur við skjóttgangandi báti til Hvalbiar og haðani varð hann koyrdur til Lopra.

Um 30 tímar

Á miðdegi í gjár vóru teir farnir undir at skifta høvdið á borinum.

Grótið er hart at bora ígjøgnum og høvdið heldur ikki meiri enn einar 30-40 tímar, so er tað uppslitið.

Tað tekur einar 12 tímar at skifta høvdið, so tað skuldi verið klárt at bora aftur í nátt.

Teir vóru komnir 2307 metrar niðri, tá ið borurin bleiv í óstandi og arbeiðið mátti leggjast niður fyribils.

Bora verður einar tveir metrar um tíman.

Tvs. at um 30 tímar rokna teir við at verða komnir niður í eitt avgerðandi punkt, sum er uml. 2360 metrar niðri.

Har vísa kanningarnar, at jarðløgini broytast. Eingin veit, hvat teir koma niður á, men bæði borifólkið, jarðfrøðingar og annars øll, við áhuga, eru sera spent uppá, hvat er niðri á 2360 metrum.

Tórshavnar býráð søkir eftir pedagogum og hjálparfólkum

Treytað av góðkenning landsstýrisins fer Tórshavnar býráð at seta í verk skipan, soleiðis at forskúlabørn og børn, sum byrja í 1. flokki aftaná summarfrítíðina, kunnu fáa tilboð um ansing eftir skúlatíð.

Í hesum sambandi verður søkt eftir fólki við royndum frá arbeiði við børnum í skúlaaldri.

Arbeiðstíðin verður parttíð og vil í stóran mun fara fram á skúlunum.

Løn sambært galdandi sáttmála.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara ella Jens M. Poulsen, býráðsskrivara, tlf. 15160.

Umsókn við prógvum o.o. verður at senda Tórshavnar býráð, postboks 32, í seinasta lagi 19. august 1996.

Tórshavnar býráð

Byrja dagin við Sosialinum – so veitst tú hvat hendir!

✝

Vores kære mor

ELISABETH FUCHS
født Zachariassen
f. 19. juli 1917

er stille sovet ind 8. august 1996

På familiens vegne

Georg og Sune

Begravelsen foregår fra Frederiksberg kirke torsdag 15. august kl. 13.00

Zarepta 1996

Um Gud vil, verða hesar legur í ár í Zarepta í Vatnsoyrum:

Lega fyri 18 ár og eldri	15.08.	til	18.08.
Bibliuskeið	01.09.	–	08.09.
Mansstevna	13.09.	–	15.09.
Kvinnustevna I	20.09.	–	22.09.
Kvinnustevna II	27.09.	–	29.09.

Tekning til legurnar fer fram á tlf. 32140 ella fax 33141.

Húsini fóru illa

RANDI JACOBSEN

Leygardagin klokkan hálvgum fimm seinnapartin varð sløkkiliðið í Havn boðsent, tí eldur var í einum húsum á Skriðubakka í Kaldbak.

Eldurin varð sløktur, men politiið sigur, at húsini fingu stóran skaða bæði av eldi, royki og vatni.

Ein maður hevði fyrr um dagin arbeitt í kjallaranum við vinkulslipara. Tað kann hava verið orsøk til eldibrandin, sigur politiið.

INNBJÓÐING • BILSTEREO • INNBJÓÐING • BILSTEREO

INNBJÓÐING!

vit bjóða tær at hoyra bil við

4.500 WATT

Rættilig Hi-Fi watt (RMS)

Á TORGINUM Í SMS

Frá 13.08 - 17.08 hava vit framsýning á torginum av einum bili, sum serfrøðingar frá JBL í USA saman við "Danmarks-meistaranum" í bilstero, Thomas Ravn hava designað og bygt!

KOM OG HYGG OG HOYR!

ELDING

SMS • Tlf. 18662 ella 18663